# Landsstýrismaður krevur at skattalættin verður broyttur

**Hans Pauli Strøm vil ikki góðtaka skattalættan, sum samgongan hevur stungið út í kortið. Hann skal broytast tí hann er ein háðan ímóti fakfeløgunum, sigur hann**

SKATTALÆTTIN
áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Skattalættin hjá samgonguni skal broytast.

Tað sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður fyri javnaðarflokkin.

Sostatt má staðfestast, at samgongan helt ikki meir enn eina lítla viku, áðrenn hon fekk sín fyrsta innanhýsis trupulleika at dragast við.

Skattalættin, sum samgongan hevur fráboðað, hevur verið fyri øgiligum atfinninginum frá fakfeløgunum. Tað kemst av, at eftir ætlanini, verða tað tær høgu inntøkurnar, sum fáa tann størsta skattalættan, samstundis sum láginntøkurnar fáa lítið og onki í skattalætta.

Men nú eru tað ikki bara fakfelagsfólk, sum krossfesta skattalættan, tí nú eru tað eisini limir í sjálvari samgonguni, sum tala at.

*– Fráboðaði skattalættin hjá samgonguni er ein háðan ímóti fakfeløgunum og tí skal hann broytast, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður*

### Góðtekur ikki útspælið

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur, at hann kann ikki góðtaka, at skattalættin hjá samgonguni verður latin, soleiðis, sum hann er fráboðaður.

Hann sigur, at tískil skal skattalættin broytast, so at hann lág- og miðalinntøkurnar fáa størri gagn av honum.

Hann sigur, at hann var ikki við til sjálvar samráðingarnar til samgonguna.

– Men tað var ein greið avtala ímillum flokkarnar, at skattalættin skuldi koma lág- og miðalinntøkunum til góðar.

– Tí er fýlist hann á, at skattalættin er fráboðaður soleiðis, sum hann er, og hann skilir fullvæl tað stóru ónøgdina hjá fakfeløgunum.

Kortini vísir hann á, at talan er enn bara um eitt uppskot hjá samgonguni.

Fyrsti parturin av skattalættanum verður ikki settur í verk, fyrrenn 1. januar, so samgongan hevur hampiliga góða tíð til at viðgera hann nærri, áðrenn eitt endaligt uppskot skal leggjast fyri løgtingið.

– Og eg ivist ikki í, at tá ið samgongan hevur viðgjørt skattalættan í smálutir, verður úrslitið eisini tað, at tey fáa skattalættan, sum hava mest tørv á honum.

– Tað, sum samgongan hevur fráboðað, er ein vánalig byrjan uppá skattapolitikkin, leggur hann afturat.

Landsstýrismaðurin heldur, at tað er ógvuliga umráðandi, at fakfeløgini vilja taka undir skattalættanum hjá samgonguni.

– Tað er neyðugt fyri at samstarv við feløgini við onnur viðurskifti eisini.

Og skulu vit hava samstarv við fakfeløgini, nyttar ikki at leggja til brots við einum skattalætta, sum er ein háðan ímóti teimum, sigur Hans Pauli Strøm.



# Hans Pauli Strøm byrjar tíðliga

**Jørgen Niclasen heldur at tað er løgið, at fráboðaði skattalættin longu skal elva til stríð innanhýsis í samgonguni**

SKATTALÆTTIN
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tað var nú tíðliga, at Hans Pauli Strøm byrjaði!

Jørgen Niclasen, formaður fyri fólkaflokkin, er alt annað enn fegin um, at ein partur av samgonguni nú er farin at mótmæla politikkin hjá samgonguni, longu nú, hon ikki hevur sitið í meiri enn nakrar fáar dagar.

Tað er sjálvsagt fráboðaði skattalættin, sum vit tosa um!

Fakfeløgini hava funnist hvassliga at fráboðaða skattalættanum og nú tekur landsstýrismaður javnaðarfloksins undir við teimum og krevur broytingar.

Eftir tí, sum Jørgen Niclasen sigur, kann hetta ikki uppfatast sum annað enn, at eitt tekin um, at javnaðarflokkurin í samgonguni longu er linkaðu í kongunum.

Jørgen Niclasen sigur at fráboðaði skattalættin er ein avtala í samgonguni.

Men hann heldur eisini, at hetta er ein máti hjá Hans Paula Strøm at gera vart við seg politiskt og tað dámar honum einki.

– Meinar Hans Pauli Strøm veruliga nakað við sítt mótmæli ímóti skattalættanum, skuldi hann havt tikið tað til viðgerðar innanhýsis í samgonguni.

– Men vil hann vissa sær at fáa so lítið burturúr sum gjørligt, so skal hann júst gera, sum hann hevur gjør og tað er at profilera seg í fjølmiðlunum.

Men Jørgen Niclasen heldur, at tað var nú tíðliga, at Hans Pauli Strøm byrjaði at leggja seg út í málsøki hjá øðrum landsstýrismann. Hann mátti annars havt úr at gjørt við at umsita sítt egna málsøki, sum er tað mest umfatandi málsøki av øllum.

### Var ikki við

Formaður fólkafloksins á tingi staðfestir, at Hans Pauli Strøm var ikki við í samráðingunum um nýggja samgongu.

– Tí hevur hann ikki ánilsi av, hvat er farið fram við samráðingarborðið.

Men sjálvur var tingmaðurin úr Vágum við.

Og hann heldur ikki, at nøkur avtala er brotin og at fráboðaði skattalættin ikki er tað, sum avtalað er frammanundan, soleiðis sum hans Pauli Strøm vil vera við.

Jørgen Niclasen vísir á, at í samráðingunum er spurningurin um skattalætta og samhaldsfasti eftirlønargrunnurin eru samantvinnað.



*– Samgongan hevur tengt skattalættan og samhaldsfasta eftirlønargrunnin saman. Sigur javnaðarflokkurin avtaluna upp, mugu vit samráðast um alt av nýggjum, sigur Jørgen Niclasen, formaður fyri fólkaflokkinum á tingi*

– Javnaðarflokkurin kravdi at fáa samhaldsfasta uppí fyri at hann kundi betala meiri út til eftirløn.

– Úrslitið er skrivað niður í eitt skjal, sum eisini javnaðarflokkurin hevur undirskrivað.

– Men ætlar javnaðarflokkurin at siga avtaluna upp, so er ein nýggj støða og so mugu vit samráðast um skattalættan og samhaldsfasta av nýggjum, sigur formaður fólkafloksins á tingi.

Og hann leggur dent á, at orsøkin til, at tær lægru inntøkurnar merkja so lítið til skattalættan er júst tann, at allir løntakarar skulu betala meir í samhaldsfasta hereftir.

– Men tað var eftir kravið frá javnaðarflokkinum sjálvum. Og hóast inngjaldið til samhaldsfasta skal hækka, er kortini talan um ein skattalætta til lágar inntøkur.

### Arbeiðaravinarligur skattastigi

Jørgen Niclasen sigur, at tað, sum var til umrøðu í samráðingunum til nýggja samgongu, var at finna ein leist fyri, hvussu ein arbeiðaravinarligur skattastigi sá út, tí tað er skattastigin ikki.

– Í løtuni renna sjálvt inntøkur upp á 170.000 seg uppundir skattaloftið. Tað hava vit nú broytt, so at tað markið verður flutt upp til 300.000 krónur. Samstundis skal botnfrádrátturin hækka.

– Men orsøkin til, at heilt lágar inntøkur merkja so lítið til skattalættan er, at tær betala so lítið í landsskatti. Lágar inntøkur betala næstan bara kommunuskatt og tað kann landið onki gera við.

Úrslitið verður, at lág og miðalinntøkur koma ikki at betala meiri enn 40% í skatti og tey renna seg ikki í skattaloftið, fyrrenn inntøkan er komin upp á 300.000 krónur.

– Stóra fjøldin av skattgjaldarum forvinna ímillum 170.000 - og 300.000 krónur um árið og ti hevur tað týdning at gera ein skattastiga, sum ikki tekur hugin frá hesum bólkinum at arbeiða.

Tó ásannar Jørgen Niclasen, at samgon gan fór ikki heilt í dýpdina, men vit hava avtalað leistin og tað hevur javnaðarflokkurin undirskrivað.



# Skattalættin viðgerast víðari í samgonguni

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at fráboðaði skattlættin fer at geva stórari fjøld av skattaborgarum ein hampiliga stóran skattalætta**

SKATTALÆTTIN
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Skattalættin, sum vit hava fráboðað, fer at geva eini stórari fjøld v føroyingum ein hampiligan trivaligan skattalætta.

Tað sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Men hann sigur kortini, at hann dugir væl at síggja trupuleikan, sum fakfeløgini hava av skattalættanum, tí tað eru ikki tey lægst løntu, sum fáa so stóran fyrimun.

Men hinvegin betala tey við heilt lágari løn, heldur ikki nógvan skatt og Bárður Nielsen heldur, at tað skal eisini vera eitt minstamark fyri, hvussu lítið skal betalast í skatti.

Hann vísir á, at tað eru 12.000 skattgjaldarar sum hava eina løn ímillum 170.000 og 300.000 krónur og hjá teimum ger skattalttin góðan mun.

Sostatt fær ein triðingur av skattaborgarunum ein munagóðan skattalætta.

Hinvegin forvinna 5.700 skattgjaldarar yvir 300.000 krónur um árið. Nakrir av teimum, fáa eisini fyrimun, men tey við teimum heilt høgu lønunum, fáa onki burturúr.

Men eitt, sum tekur nakað av skattalættanum er, at samstundis skulu øll betala eitt sindur meir til tann samhaldsfasta eftirlønargrunnin.

### Skal viðgerast nogv meir

Hann vil annars ikki gera viðmerkingar til tað, at eisini limir í samgonguni nú eru farnir at mótmæla skattalættanum. Men hann sigur kortini, at hann dugir væl at síggja trupuleikan, sum fakfeløgini hava av skattalættanum, tí tað eru ikki tær lægst løntu, sum fáa so stóran fyrimun.

– Tað er rætt, at tey, sum forvinna lítið fáa eisini lítið í skattalætta. Men hinvegin betala tey heldur ikki so nógvan skatt

Og Bárður Nielsen heldur, at tað skal eisini vera eitt minstamark fyri, hvussu lítið skal betalast í skatti.

Hann vil annars ikki gera viðmerkingar til tað, at eisini limir í samgonguni nú eru farnir at mótmæla skattalættanum.

– Hetta er eitt uppskot sum skal hava drúgva viðgerð í samgonguni, áðrenn tað verður sett í verk, sigur hann.

Men hann sigur, at uppskotið er snikkað saman sum tað er, fyri at eisini handverkarar, lærarar, sjúkrasystrar, pedagogar og onnur, sum ikki kunnu sigast vera hálønt, somuleiðis skulu fáa nakað burturúr.

Og endamálið er, at løntakarar skulu fáa nakra nyttu burturúr teimum lønarhækkingum, tey fáa, tí tað faá tey ikki sum er. Hvørja ferð, tey fáa fimm krónur í lønarhækking, betala tær næstan tríggjar krónur í skatti og tað kann ikki vera rætt.



*Bàrður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum er opin fyri at broyta skattalættan hjá samgonguni*

# Kappingin um føroysku rækjurnar verður størri

**Samstundis, sum føroyingar eftir 1. januar 2005 eisini kunnu keypa og selja eitt nú íslendskar og norskar rækjur uttan toll, veksur kappingin um føroysku rækjurnar, tí tollfyrimunirnir koma ikki bert føroyingum til góðar, men eisini teimum londum, vit kunnu keypa rækjur frá**

RÆKJUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Ein partur av avtaluni, sum Føroyar og ES gjørdu stutt fyri árslok, snýr seg um, at føroysk virkir kunnu keypa eitt nú íslendskar og norskar rækjur og selja tær á ES-marknaðinum uttan toll. Avtalan kemur í gildi, 1. januar ár 2005 og snýr seg um eitt samlað loft, sum er 3.000 tons av lidnum rækjuvørum um árið.

- Í dag er skipanin hon, at vit kunnu ikki keypa útlendskar rækjur og selja tær til ES uttan at gjalda ein toll uppá 20%. Hetta ger, at tað er ikki lønandi at keypa aðrar rækjur enn tær, ið føroysku rækjuskipini fiska.

Men loft er eisini á, hvussu nógvar føroyskar rækjur kunnu seljast tollfrítt inn í ES, og her er loftið júst tað sama, nevniliga 3.000 tons.

### Møguleikar og kapping

Hans Jóhannes á Brúgv, stjóri hjá O.C. Joensen á Oyri, sigur, at nýggja avtalan gevur øktar møguleikar, men hon skapar í prinsippinum eisini kapping.

- Nú verður tað soleiðis, at kappingin um føroysku rækjurnar verður størri, tí tollfyrimunirnir koma eisini íslendsku og norsku rækjuvirkjunum til góðar. Samstundis, sum vit kunnu keypa og selja eina ávísa nøgd av útlendskum rækjum sum føroyskar, kunnu virkini í hinum londunum gera tað sama.

Stjórin á Rækjuvirkinum dugir ikki at siga, hvat broytingin kemur at merkja í praksis, og enn gongur eisini tað mesta av einum ári, áðrenn avtalan verður sett í verk.

- Sum nýggjur í starvinum á Oyri, eri eg ikki heilt greiður yvir, um eitt nú íslendingar og norðmenn hava aðrar internar forðingar, sum eg ikki veit um í løtuni. Men hetta kemur tíðin at vísa, sigur Hans Jóhannes.

### Balta-londini í ES

Eitt annað, sum eisini kann koma at fáa týdning, nú avtalan við ES er komin uppá pláss, er, at baltisku londini eisini koma uppí ES.

- Hesi lond fiska eisini eitt sindur av rækjum, og tí er torført longu nú at siga, hvat avtalan í longdini kemur at merkja, sigur Hans Jóhannes á Brúgv.

Á Rækjuvirkinum á Oyri eru tey annars til arbeiðis hvønn dag, og arbeitt verður í tvey-skiftivakt. Eini 60 fólk eru í rækjunum og eini 20 í skeljunum.

Skeljatíðin verður liðug síðst í hesum mánaðinum.



*- Enn er torført at meta um, hvat nýggja avtalan við ES um tollfríar íslendskar og norskar rækjur kemur at merkja í praksis, sigur nýggi stjórin hjá O. C. Joensen á Oyri, Hans Jóhannes á Brúgv*

# Pjerrot á Torginum í SMS

**Fríggjadagin kl. 17.00 ber til at hitta klovnin Pjerrot úr Cirkus Arena á Torginum í SMS**

KLOVNUR
Tíðindaskriv

Í sambandi við framførslurnar hjá Cirkus Arena í Føroyum í vikuskiftinum, er klovnurin Pjerrot komin til Føroyar eitt sindur áðrenn hini úr sirkusinum, og hann fer at hita upp á Torginum í SMS fríggjadagin kl. 17.00.

Hann fer at undirhalda á pallinum við sangi, tónleiki og gandakynstri.

Cirkus Arena fer at ferðast kring landið frá leygardegnum av, og fara tey at hava íalt 5 framførslur í Føroyum, umframt tí í SMS. Á sirkus-ferðini hesaferð, hevur Cirkus Arena m.a. við sær slangumenniskju úr Marokku, sum m.a. kunnu binda knút á seg sjálvi, franska BMX-heimsmeistarin, afrikanskan fimleik á heimsstøði og klovnarnar Martino og Co. og Pjerrot, sjálvandi.

Framførslurnar hjá Cirkus Arena verða soleiðis, í Runavík leygardagin kl. 16.00, í Havn sunnudagin kl. 15.00 og 18.00, í Trongisvági mánadagin kl. 19.00 og í Klaksvík týsdagin kl. 19.00. Allar framførslurnar verða í ítróttarhallunum á nevndu støðum. Atgongumerki fáast í forsølu í Bónus, og við dyrnar ein tíma undan sýningunum.

